*– Vit hava so haldgóð prógv, at grundarlag er fyri at ákæra forsetan*

*(ísraelska løgreglan)*

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK



# Forseti kann ákærast fyri neyðtøku

**Ísraelski forsetin, Moshe Katzav, kann ákærast fyri neyðtøku og annan kynsligan ágang, men tað er tjóðartingið, sum ger av, um hann skal ákærast**

– Vit hava nóg mikið av próvtilfari, sum gevur ábendingar um, at forsetin hevur framt neyðtøku og annan kynsligan ágang, stendur í einari kunngerð frá ísraelsku løgregluni, sum hevur fingið kærur frá fleiri kvinnum, sum hava arbeitt hjá Moshe Katzav. Í kunngerðini frá løgregluni stendur eisini, at løgreglan hevur haldgóðar upplýsingar, sum prógva, at forsetin hevur brotið lógina um avlurting.

Kunngerðin frá løgregluni kom, beint eftir at leiðslan í løgregluni hevði havt fund við Menachem Mazuz, løgmálaráðharra.

Í sambandi við kanningarnar hevur ísraelska løgreglan kannað meiri enn tíggju kærur um neyðtøku og annan kynsligan ágang. Summar av kærunum stava frá teirri tíðini, tá Moshe Katzav var ráðharri, men nakrar eru eisini frá hansara forsetatíð. Allar kærurnar eru frá kvinnum, sum hava arbeitt hjá honum.

Tann 61 ára gamli forsetin, sum er giftur og eigur fýra børn, vísir øllum skuldsetingunum aftur, og hann vil vera við, at skuldsetingarnar eru als ikki kannaðar. Skal forsetin fyri rættin, skal tjóðartingið fyrst taka politiska órinið frá honum, og tí liggur avgerðin í tinginum.



*Moshe Katzav hevur verið forseti í Ísrael síðani 2000.*

## STUTT SAGT

### Kann gera kvetti

Maria Borelius fekk bara átta dagar í starvinum sum svenskur handilsmálaráðharri. Hon fær tí ikki tær 97.000 svensku krónurnar, sum hon hevði ætlað sær í mánaðarløn tey næstu fýra árini. Heilt sør verður hon kanska ikki. Sambært Aftonbladet eru ongar reglur um, hvat ein ráðharri skal fáa í eftirløn, tá hann fer frá eftir so stuttari tíð. Tað vanliga er eftirløn í eitt ár, so kanska fær Maria Borelius 1,2 mió. krónur burtur úr kortini.

### Delfin á vitjan

Teir seinastu dagarnar hava fólk við Oslofjørðin hugnað sær við at eygleiða eina delfin, sum liggur og spælir sær í vatnskorpuni, og sum av og á ger eitt lop uppúr. Norskir fiskifrøðingar siga, at delfinin er komin úr Norðsjónum, og at hon hevur elt brisling haðani og inn á Oslofjørðin. Hetta var ikki vanligt fyrr. Fiskifrøðingarnir siga tó, at tey seinastu árini er tað hent næstan á hvørjum ári, at delfinir elta brisling inn á Oslofjørðin.

### Yrkjandi forseti

Forsetin í Turkmenistan, Saparmurat Niyazov, ber orð fyri at duga væl at geva fólki annað enn politikk og landins støðu at hugsa um. Hansara seinasta hugskot í so máta er eitt yrkingasavn, sum kom út um vikuskiftið, og sum hevur heitið "Turkmenistan, mín eydna". Hetta er hansara fimta yrkingasavn, og sjálvur sigur høvundurin, at søvnini eru ein ótømandi kelda, haðani turkmenska fólkið kann fáa íblástur til gerandisdagin.

# Slørið spjaðir bretar

**Bretskir politikarar ávara ímóti at elva til spjaðing millum muslimar og onnur í Bretlandi**




Skulu tær muslimsku kvinnurnar í Bretlandi ganga við sløri fyri andlitið ella ikki? Tað er tann stóri spurningurin, sum bretar tosa um í hesum døgum, og sum hevur elvt til spenning millum muslimar og tey, sum ikki eru muslimar.

Alt byrjaði í næstsíðstu viku, tá tann muslimska Aishah Azmi fekk sekkin sum lærari á einum skúla í West Yorkshire, tí hon vildi ikki taka slørið av andlitinum í skúlatíðini. Hon var lærari í enskum, men næmingarnir kærdu seg um, at teir skiltu hana ikki nóg væl. Hon fekk tí boð um at taka slørið av í skúlatíðini, og tá hon segði nei, bleiv honm koyrd til hús. Nú hevur hon stevnt skúlanum.

Hetta hendi bara nakrar dagar eftir, at fyrrverandi uttanríkisráðharrin Jack Straw hevði sagt, at hann bað altíð muslimskar kvinnur taka slørið frá andlitinum, tá tær komu at tosa við seg um okkurt. Muslimskir felagsskapir vóru í øðini inn á Straw og løgdu hann undir vantandi virðing fyri øðrum.

Nú hava aðrir politikarar lagt seg út í orðaskiftið. Teirra millum er kommunu- og landspartaráðharrin, Phil Woolas, sum eisini umsitur mál viðvíkjansi etniskum bólkum. Hann tekur undir við leiðsluni á skúlanum í West Yorkshire og sigur, at tað var rætt at geva Aishah Amzi sekkin. Tað hevur ikki bøtt um hýrin í teimum muslimsku felagsskapunum, sum hótta við at draga ráðharran í rættin.

Samstundis ávarar tann konservativi politikarin David Davis bretar ímóti at lata slørið hjá teimum muslimsku kvinnunum spjaða bretska samfelagið, men hann ávarar samstundis um, at bretar mugu varðveita tali- og skrivifrælsið. Sjálvur tekur hann undir við tí, sum Jack Straw hevur sagt, og teir báðir eru ikki einsamallir. Sambært einari meiningakanning halda 57 prosent av bretunum, at teir bretsku muslimarnir eiga at laga seg meiri eftir bretskum viðurskiftum, og 53 prosent eru samd við Jack Straw um, at slørið hjá teimum muslimsku kvinnunum elvir til frástøðu.

**Eisini kristin**

Men tað eru ikki bara teir muslimsku bretarnir, sum eru í øðini í hesum døgum. Nógvir kristnir bretar eru í øðini um, at tann 55 ára gamla Nadia Eweida bleiv noydd úr starvi sínum hjá flogfelagnum British Airways, tí hon hevði ein kross hangandi í einari hálsketu.

Nadia Eweida arbeiddi í móttøkuni hjá British Airways í Heathrow-floghavnini í London. Felagið kravdi, at hon skuldi fjala krossin, meðan hon var til arbeiðis. Tað vildi hon ikki, og so bleiv hon noydd úr starvinum.

Í dag hava fleiri kristnir felagsskapir mótmælt í Heathrow-floghavnini, og einstakir politikarar hava sagt, at teir fara ikki at flúgva við British Airways aftur.